# Julian og Kurt í eldin

**Setningurin hjá føroysku spælarunum í norskum fótbólti fer fyrst og fremst at snúgva seg um at varðveita plássið í bestu deildini**



*Kurt Mørkøre*

Eftir at teir hava fyrireikað seg so at siga stútt, síðani Songdal fyrst í november í fjør megnaði at vinna sær pláss í tippuliguni, verður tað nú álvari. 2. páskadag verður sjøtul settur á nýggja kappingarárið í Noregi, og longu frammanundan vita Julian Johnsson, Kurt Mørkøre og øll hini í Sogndal, at tað fyrst og fremst fer at snúgva seg um at varðveita plássið í bestu deildini.

Fyrsta ábendingin um, hvussu Sogndal er fyri, fæst mánadagin. Tá skal Sogndal til Skien at spæla ímóti Odd Greenland. Hetta er eitt lið, sum er kent fyri at hava eina sera góða verju og fyri at vera væl skipað um allan vøllin.

Á heimasíðuni hjá VG verður roknað við, at Odd Greenland fer at megna eitt sætta pláss í nýggja kappingarárinum. VG roknar ikki við, at Sogndal fer at gera tær stóru skreytirnar. Tað eru fjúrtan lið í bestu norsku deildini. Tvey teirra flyta beinleiðis niður, og metingin hjá VG sigur, at Sogndal verður annar av niðurflytarunum. Teir fara at enda á næstaftasta plássinum er metingin.

Fótbóltsserfrøðingarnir í størsta dagblaðnum í Noregi halda, at fótbóltsevnini eru góð á liðnum hjá Sogndal. Men teir siga seg ikki rokna við, at breiddin er nóg stór til at varðveita sessin.

– Sogndal fer onkuntíð at megna púra óvæntað úrslit, men tyngdin á liðnum er ov lítil til 26 umfør, sigur VG, sum heldur, at størstu veikleikarnir á liðnum eru at finna í verjuni.

Miðalaldurin í Sogndal er tann lægsti yvirhøvur í tippuliguni. Níggju spælarar eru yngri enn 21 ár, og yvirhøvur er miðalaldurin 23,6 ár. Tað vil við øðrum orðum siga, at teir báðir føroyingarnir toga miðalaldurin ikki so lítið uppeftir. Julian Johnsson varð 24. februar 26 ár, og Kurt Mørkøre er aldursforseti í Sogndal. 20. februar fylti hann 32.

Mest umrøddi spælarin á liðnum hjá Sogndal er Tommy Øren. 20 ára gamli álopsfelagin hjá Kurt Mørkøre er sera evnaríkur. Tað verður roknað við, at hann skjótt verður at finna í onkrum av fremstu liðunum í Noregi, ella at hann verður seldur til Onglands, men higartil hevur hann víst tilboðunum frá sær og heldur seg til trý ára sáttmálan við Sogndal

## Órógvarðir í fyrireikingunum

Í Sogndal hava teir verið plágaðir av nógvum skaðum í fyrireikingartíðini til nýggja kappingarárið. Julian Johnsson breyt beinið, men kom seg óvanliga skjótt aftur. Og tá teir í síðstu viku vóru á venjingarlegu í Leeds í Onglandi, var Kurt Mørkøre ikki við. Teir spældu ein venjingardyst á vegnum til Onglands. Tá hevði Kurt fingið krím og fór aftur til Sogndal, meðan hinir fóru til Leeds, har teir vóru millum áskoðararnar, tá Leeds í europeisku meistarakappingini vann 3–0 á Deportivo La Coruna.

Á ferðini spældi Sogndal ein venjingardyst ímóti Tromsø, sum eisini er í bestu norsku deildini, og tað gekk einki serligt. Tromsø vann 3–0.

Í VG verður Julian Johnsson ikki roknaður millum teir fyrstu ellivu, men hann verður kortini – saman við Kurt Mørkøre – nevndur millum lyklaspælararnar. Blaðið sigur seg ivast í, um Kurt Mørkøre fer at megna at skora eins nógv mál í tippuliguni, sum hann gjørdi í næstbestu deildini í fjør. Víst verður á, at ferðin er væl hægri, og at Kurt Mørkøre ikki hevur verið serliga sjónskur í venjingardystunum.

Nú fáa vit at síggja, hvussu tað fer at hilnast. Vit fara sjálvandi at fylgja væl við okkara monnum í Noregi. Teir fara at vera í eldinum fram til 28. oktober, tá 26. og síðsta umfarið í tippuliguni er á skránni. Burtursæð frá tá landsdystir eru, verður spælt hvønn sunnudag, so tað verður ikki fyrrenn í oktober, at Julian og Kurt fara í summarfrí. Jú tað er hart at spæla fótbólt, sum maðurin segði á sinni.

**jh**


# 50 Leirvíksfjarðarleiðin

Frá 12. apríl til 30. apríl, siglir M/F Scania eftir hesi ferðaætlan:

Sigling artíð: 40 min.

| Dagur | Klaksvík Kl. | Klaksvík Viðm. | Fuglafjørður Kl. | Fuglafjørður Viðm. |
|---|---|---|---|---|
| x | 06:00 | Samb. við 400 | 06:50 | |
| x6 | 07:50 | | 08:40 | |
| x67 | 09:40 | Samb. við 400 | 11:10 | Samb. við 400 |
| x67 | 12:20 | Samb. við 400 | 13:35 | Samb. við 400 |
| x6 | 14:45 | Samb. við 400 | 15:35 | Bíða 20 min. |
| x67 | 16:45 | Samb. við 400 | 17:35 | Samb. við 400 |
| x67 | 18:25 | Samb. við 400 | 19:35 | Samb. við 400 |
| 7 | 20:25 | | 21:15 | Samb. við 400 |

2. páskadag verður siglt sum sunnudag.

Snarbussur millum Tórshavn og Fuglafjørð gerandisdagar:

Fuglafjørður - Tórshavn kl. 06:45
Tórshavn – Fuglafjørður kl. 16:20

Barsskor siglir í sambandi við flogrutun a sunnudag og 2. páskadag, kl. 07:15 av Klaksvík.

STRANDFARASKIP LANDSINS
Rutuupplýsingin, tlf. 34 30 30
Heimasíðan: www.ssl.fo

Føroya største úrval av
PAKKITILFARI
úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir

Vit útvega eisini:
* Plastbakkar
* Pakkibond, tape
* Merkir, etikettir
* Knívar
* Kitlar, húgvur, handskar, svintur o.l.
* Ymisk tól til ídnaðin
* Reingerðisevnir
* Íblandingarevni
* Plattar
* Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari

...sjálvandi til besta prísin!!

FARPACK
Staravegur 5, P.O. Box 3099
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 35 30 00
Fax +298 35 30 10
E-mail: farpack@farpack.com
www.farpack.com

KIA
CARNIVAL
2.9 Dohc Turbo-Diesel
16 V, 126 HK, 5 hurðar
Sosialurin - 311820





Rætti bilurin til mong endamál.
Pláss fyri 7 fólkum
og hópin av viðføri.
D. B. Bilar
Tel. 310 600

JÄSPI KETLAR
Teir vælumtóktu ketlarnir eru á goymslu





Bæði dupultir og einkultir
Skulu tygum hava nýggjan ketil, so tosið við okkum og fáið eitt gott tilboð.
Vit hava serkøn fólk, ið geva eina skjóta og góða tænastu.
- Alt tilfar til hitaverk og sanitet fæst hjá okkum
MARIA POULSEN & CO
Smyrilsvegur 8 - tlf. 312000

# Dagrøktin í Leirvík

søkir eftir dagrøktarum og fyribilshjálp.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til leiðaran á tlf. 443251.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. apríl 2001.

**Dagrøktarskipanin í Leirvík**
Postrúm 42
520 Leirvík

Sosialurin Sosialurin -har tað hendir

ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893
ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar
ADC
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA





# Frá Eigarafelagnum Norðasta Horn

Ársaðalfundur verður mikukvøldið tann 25. apríl kl. 20.00 í býlingshúsinum.

**Nevndin**





**Leikhúsið Gríma**
sýnir leikin

*Eitur nakað land Week-end?*

av Jóanes Nielsen
leikstjórn Eyðun Johannessen
á Meiarínum

| | | |
|---|---|---|
| 2. páskadag | 16.04.2001 | kl. 18.00 |
| týskvøldið | 17.04.2001 | kl. 20.00 |
| mikukvøldið | 18.04.2001 | kl. 20.00 |

Atgongumerki á kr. 100,- fáast á Kunningarstovuni og við dyrnar 1 tíma undan sýning. Bólkar uppá 10 ella fleir fáa 20% avsláttur.

# Lærlingur til smykkudeildina í 3-aranum søkist

Vit bjóða tær eitt spennandi arbeiði innan smykkur/prýði/steyp o.l. og alt, ið hoyrir til eina professionella gull/silvur deild. Í deildini starvast 2 urmakarar; ein útlærd innan gull&silvur og eitt hjálparfólk.

Vit væntað at tú ert fryntligur/ ágrýtin og ikki bangin fyri at arbeiða nógv, tá tað krevst, møtir altíð til tíðina, vælsignerað við einum smíli og klár til dagsins uppgávur.

Tú mast hava FHS, lærutíðin er 3 ár, við skúlagongd í DK av og á.

Nærri fæst at vita við at ringja til Gissur á tlf. 316769 ella 213535.

Er hetta nakað fyri teg, so send eina umsókn við prógvum og viðmælum til

3arin

Gissur Patursson
Tórugøta 14
FO 100 Tórshavn

---

3-arin er handil í sms; har starvast 12 fólk; handilin hevur 4 deildir: smykkudeild/fløgudeild/fotodeild og tøknideild.

**Almanna- og Heilsumálastýrið**
*Starvsfólkadeildin*

**ENDURLÝSING**
Vegna ov fáar umsóknir verður starvið sum leiðsluskrivari á psyk. deplinum lýst leyst av nýggjum.

**Landssjúkrahúsið**
FO-100 Tórshavn

# Leiðsluskrivari

Starvið sum leiðsluskrivari á psyk. deplinum er leyst at søkja til setan skjótast gjørligt og fyribils fram til 31. august 2001.

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum:**
- skrivari hjá leiðsluni í psyk. deplinum við tilvísing til leiðandi yvirlæknan og yvirsjúkrasystrina
- fíggjarstýring
- samskipari hjá leiðsluni v.v. starvsfólkafyrisiting og útbúgving
- fyrisitingarligt arbeiði so sum brævaskifti, journalisering v.m.
- bindilið millum sjúkrahúsleiðsluna og depilsleiðsluna

**Krøv til umsøkjaran:**
- skrivstovufólk við handilsskúlaprógvi
- ella læknaskrivari við góðkendari útbúgving og útbúgving innan skrivstovuyrkið
- evni til at raðfesta og planleggja arbeiðið
- edv-førleiki á brúkarastøði.
- kunna arbeiða sjálvstøðugt
- førleiki í føroyskum og donskum bæði skrivliga og munnliga
- góð samstarvsevni og tænastuhug
- góður røkjuskapur

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt fjølbroytt starv
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- ávirkan á fakliga menning
- góða innleiðslu (introduktión)

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið. Starvið er í løtuni flokkað í 20 lønarflokki.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Bergit Weihe, yvirsjúkrasystir á tlf. 31 35 40, lokal 351, har biðjast eisini kann um eintak av starvslýsingini, ella til Sofus Joensen, leiðandi yvirlækna, lokal 301.

Umsóknarfreistin er 27. apríl 2001, kl. 12.00

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

# Ídnaðarbygningur í Trongisvági til sølu

Stoypivirki í Trongisvági til sølu um hóskandi boð fæst.

Bygningurin er 360 m².

**0045-98468867** ella **371558**

# Kontór og lagurhølir

Ca. 850 m² uppi í Hoyvík er til leigu. Góðir tilkoyrings- og parkeringsmøguleikar.

**Sosialurin**
Box 76
110 Tórshavn
**Bill.mrk. 171**

VEGG SAGING
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.
HOL SAGING
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.
GÓLV FRESING
GÓLV SAGING
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.
GÓLV SLÍPING
Sosialurin - 311820
Nýggj tænasta til allar havnir í Føroyum.
Nú bora vit eisini hol í allar støddir av dekkum til fríhold.
FØROYA BETONG SAGING v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

# Hús til sølu

á Skála. Boð undir 600.000 kr. ongan áhuga.

**Tlf. 0045 29282316**

Lesið
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg

Felagið fyri Skrivstovu- kramba- og teknisk starvsfólk
Upplýsir um:
-sáttmálan
-starvsmannalógina
-frítíðarlógina o.a.
Gerist limir - so standa vit sterkari!
Tlf 316837 og 216837
Traðarvegur 20
Boks 1378
110 Tórshavn
skfelag@post.olivant.fo
Opið er soleiðis:
Mánadag - fríggjadag
9.00 - 12.00
13.00 - 16.00

Uppsetan og skipan av barrum
Til:
Brúdleyp
Rundar føðingardagar
Ársveitslur
Reseptiónir
og tílíkt





Hans á Lag Sp/f
Tlf. 21 93 83
hanslag@post.olivant.fo
Sosialurin 311820